# NSÍ sigraði í spennandi dysti

**Dysturin millum NSÍ og B36 gjørdist ein sera undirhaldandi og málríkur dystur, har liðini skiftust um at hava leiðsluna. Men tá samanumkom, var tað oddaliðið úr Runavík, sum dróg longra stráðið, tá Erland B. Danielsen legði NSÍ á odda 4-3 í síðstu løtu**






Ólavur Øre Hansen

Tað var spenningur til síðsta minutt, tá NSÍ og B36 brustu saman við Løkin týskvøldið. Alt bendi á at dysturin skuldi enda við javnleiki, men í síðsta minutti eydnaðist tað júst innskifta Erlandi Berg Danielsen at leggja runavíkingar á odda 4-3, og harvið vann oddaliðið fyri 11. ferð í seinastu 12 dystunum.

Liðskiparin hjá runavíkingum, Christian Høgni Jacobsen, var sjálvandi fegin um sigurin, sum hevur við sær at NSÍ heldur frástøðu til nærmastu kappingarneytarnar.

-Vit spældu ikki væl í fyrra hálvleiki, men við góðum stríðsvilja og dirvi eydnaðist okkum at venda gongdini eftir steðgin. Tískil eri eg sera væl nøgdur við avrikið hjá okkum, segði Chrisian Høgni Jacobsen eftir dystin.

Meðan runavíkingar kunnu frøast um sigurin, so metti Sigfríður Clementsen at hansara lið hevði uppiborið betur, men mátti ásanna at marginalarnir ikki vóru við B36.

-Eg haldi at vit spæla fult upp við NSÍ. Vit komu inn til Runavíkar eftir øllum stigunum, og eftir dystargongdini at meta, høvdu vit uppiborið at fingið stig, men kanska álopssinnaða tilgongdin kostaði okkum tað eina stigið í endanum, segði ein vónsvikin Sigfríður eftir dystin.

B36 venjarin hevur eisini alla orsøk at iðra seg um tapið, tí talan var um ein sera tættan dyst, har bæði liðini gjørdu alt fyri at fáa sigurin í hús. Mett út frá spæli og kjansum, kundi tað eins væl verið havnarmenn, sum drógu longra stráðið. Men í staðin var tað oddaliðið úr Runavík, sum hevði neyðugu marginalarnar á sínari síðu, og vann tá samanumkom.

## Hepni fylgir teymum góðu

Sagt verður at hepni fylgir teimum góðu liðunum, og runavíkingar hava eitt avbera gott fótbóltslið. Úrslitini tala fyri seg. Sigurin á B36 í gjárkvøldið, var tann 11. í seinastu 12 dystunum, og tað er einum oddaliði virðiligt.

Tískil er tað kanska ikki so løgið at "frú Fortuna" hevur hug at smílist til sigursvandu vespurnar úr Runavík, meðan teir í B36 leguni bert kunnu iðra seg um at missa eina stigið av hondum í síðstu løtu.

## Erland dagsins maður

Gestirnir vóru betra liðið fyri steðgin, men tað vóru runavíkingar sum skoraðu fyrst, tá ein verjuspælari var so óheppin at beina bóltin í egið mál, eftir at B36 málverjin hevði vart fyri eini skortroynd frá Christian Høgna Jacobsen.

Men innan farið var til hálvleik, hevði B36 skorað tvær ferðir. Fyrst javnaði Símun Joensen miðskeiðis í hálvleikinum, áðrenn Christian R. Mouritsen legði B36 á odda 2-1, tá hann skoraði uppá fríspark.

Eftir steðgin hildu bæði liðini á við sama lag, og spælið bylgjaði aftur og fram. NSÍ venjarin valdi at gera tvær útskiftingar til seinra hálvleik, til tess at styrkja um álopspartin, og gjørdi tað sítt til at vertirnir fingu betur tak á dystinum.

Runavíkingar gjørdust alsamt meira vandamiklir frammanfyri málinum sum seinri hálvleikur leið, og innan fáar minuttir miðskeiðis í seinra hálvleiki, var alt vent á høvdið. Fyrst javnaði Jóhan T. Davidsen, áðrenn Jann Ingi Petersen legði NSÍ á odda 3-2, tá hann við frísparki sendi bóltin í netið.

Fár minuttir undan dystarloki eydnaðist tað Jákupi á Borg at javnað til 3-3. Men júst sum tey flestu nokk væntaðu at málríki dysturin fór at enda við javnleiki, trein nýliga innskifti Erland B. Danielsen á pallin, og skoraði sítt fyrsta mál í landskappingini í ár, tá hann legði runavíkingar á odda 4-3, og harvið gjørdist dagsins maður hjá runavíkingum.



### NSÍ-B36 4-3 (1-2)

**1-0: Sjálvmál, 4.**
**1-1: Símun Joensen, 21.**
**1-2: Christian R. Mouritsen, 45.**
**2-2: Jóhan T. Davidsen, 64.**
**3-2: Jann Ingi Petersen, 75.**
**3-3: Jákup á Borg, 85.**
**4-3: Erland B. Danielsen, 90.**
Dómari: Eiler Rasmussen

**NSÍ:** Andras Gango - Jónhard Frederiksberg, Jens Joensen, Jóhan Troest Davidsen, Einar T. Hansen (Debes Danielsen, 46.) - Jann Martin Mortensen (Bogi Løkin, 46.), Jústinus R. Hansen, Jann Ingi Petersen, Heðin á Lakjuni - Klæmint A. Olsen (Erland B. Danielsen, 89.), Christian Høgni Jacobsen
***Gult kort:*** Jens Joensen og Christian Høgni Jacobsen
**B36:** Jóan Pauli Dahl Jakobsen - Jónas Tór Næs, Herbert í Lon, Oddmar Færø, Símun Joensen (Johan Ellingsgaard, 79.) - Bárður Olsen (Heini í Skorini, 69.), Róaldur Jacobsen, Christian R. Mouritsen, Hjalgrím Elttør (Høgni Eysturoy, 76.) - Jákup á Borg, Stig-Roar Søbstad

